Sosialurin



## Ikki 16, men 36 á muni

Leygardagin hevði Føroya Pedagogfelag aðalfund sín á Hotel Føroyum. Eitt rættiliga stórt tal av pedagogum møttu til fundin, har eisini val av formanni var á skránni. Valið stóð millum verandi formann, Jarvin Feilberg Hansen (myndin) og avbjóðarin Maud Vang Hansen. Tá til stykkis kom fekk Jarvin 36 atkvøður fleiri enn Maud - 199 ímóti 163. Munurin var sostatt ikki 19 atkvøður, sum vit søgdu í blaðnum í gjár. Jarvin fer nú undir sítt triðja skeið sum formaður í Pedagogfelagnum.




## Longri kunning

**Sandur**: Nú summarið stendur fyri framman hevur Kunningarstovan á Sandoynni tikið avgerð um at leingja um upplatingartíðirnar. Hesar verða broyttar soleiðis, at frá í dag verður opið frá kl. 9 til 12 og aftur frá 13 til 16 og soleiðis verður allar yrkadagar. Síðani 1. september í fjør hevur kunningarstovan bert havt opið gerandisdagar millum kl. 13-16, men nú summarið stendur fyri durum, so verður hetta broytt.

# Í kvøld verður samstarvið veruleiki

**Eitt av málunum til býráðsfundin í Klaksvík er góðkenning av uppskotinum til sjálvbodnu samanleggingina millum Klaksvíkar kommunu og Svínoyar kommunu. Mett verður, at samanleggingin er ein fortreyt fyri at oynni skal verða lív lagað**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Skal Svínoyggin bjargast, er neyðugt við betri og týttari ferðasambandi, halda borgarstjórarnir í Klaksvík og í Svínoy - vinstrumegin Steinbjørn O. Jacobsen í Klaksvík og høgrumegin starvsbróðir hansara í Svínoy Eyðun Jacobsen*

*Mynd: klaksvik.fo*

**Klaksvík/Svínoy**: - Nú verður tað veruleiki!

Eftir at hava fyrireikað hetta so týðandi málið fyri svínoyingar, er nú komið hartil at sáttmálin skal góðkennast av býráðnum í Klaksvík.

Hetta er so í øllum førum eitt av málunum á dagsskránni í kvøld, eftir at býráðið í juli mánaði í fjør tók ætlaðu samanleggingina til eftirtektar.

Í desember mánaði í fjør staðfesti síðani bygdaráðið í Svínoy úrslitið av fólkaatkvøðuni millum bygdarfólkið nakað frammanundan. Her varð stutt og greitt spurt, um fólk tóku undir við hesi ætlanini.

Ikki óvæntað vísti ein greiður meiriluti av fólkinum á, at hetta var einasta gongda leiðin skal hesi útoyggj verða lív lagað í framtíðini.

Síðani hevur verið arbeitt við at gera ein sáttmála um samanleggingina og framtíðar samstarvið. Hesin er síðani góðkendur í Innlendismálaráðnum, og verður eftir ætlan samtyktur í Klaksvík í kvøld.

### Ferðing og tunnil

Í fleiri ár hevur verið arbeitt við hesi ætlanini, sum nú verður veruleiki

Eitt av teimum týðandi og átrokandi evnunum, og sum eisini er ein fortreyt fyri tættari tilknýti millum Klaksvík og Svínoy, er ferðasambandið til Svínoyar.

Í fundunum millum partarnar hevur full semja verið um, at skal oynni verða lív lagað, so má henda farleiðin bøtast munandi, soleiðis at bæði akfør og fólk lættliga og fleiri ferðir dagliga kunnu ferðast til og frá oynni.

Herhevurkommunustýrið í Svínoy ta greiðu støðu, at rætta loysnin fyri oynna er ein tunnil frá bygdini og yvir í Havnina, har ein ferjulega kundi verðið gjørd. Haðani er siglingartíðin inn til Hvannasunds umleið 15 minuttir.

- Ein slík farleið hevði gjørt tað møguligt hjá svínoyingum og øðrum verða búgvandi í Svínoy og hava arbeiði inn á meginøkinum, og tað sama tann øvugta vegin.

- Tað má gerast púra greitt fyri landsmyndugleikunum og øllum Føroya fólki, at verður arbeiðið upp á hesa farleið ikki byrjað sum skjótast, so hon kann takast í brúk um heilt fá ár, so fer støðan í Svínoy bara at versna, hava bæði kommunustýrini áður víst á.

Nú er so enn eitt stig tikið á hesi leiðini. Eftir er bert at vóna, at føgru orðini verða til veruleika.

# Sundalagið fær norskan vinarbý

**Á bygdaráðsfundi í gjárkvøldið samtykti Sunda kommuna at taka upp vinarbýarsamstarv við norska kommunu.**

SAMSTARV
*Snorri Brend*

**Sundalagið:** Gongst sum ætlað verða Sunda kommuna í Føroyum og Rissa kommune í Noregi vinarbýir.

Spurningurin um vinarbýarsamstarv var eitt av málunum á bygdaráðsfundinum í gjárkvøldið.

Tilmælið um samstarvið við norsku kommununa varð einmælt samtykt.

Frammanundan hevði trivnaðarnevndin í kommununi viðgjørt málið. Her varð millum annað tosað um, hvørji samstarvsøki ið kundu verða áhugaverd fyri kommunurnar báðar.

Fyri Sunda kommunu hevur tað sín týdning, at samstarvað verður við eitt øki, sum hevur líknandi fortreytir sum teirra kommuna.

### Sama støðd

Hugsað varð í hesum sambandi um eina kommunu, sum var sett saman av fleiri bygdum ella býum og sum hevur eitt vinnugrundarlag, ið líktist teirra.

Samband fekst síðani við Rissa kommune, ið liggur nærhendis Tróndheimi og hevur um 6000 íbúgvar.

Eitt tað fyrsta stigið í samstarvinum millum kommunurnar báðar verður veruleiki seinni í hesum mánaðinum, tá umboð fyri norsku kommununa koma í Sundalagið at kunna seg um umstøðurnar.

Hetta hendir í samband við eina skúlabarnaferð til Føroya í summar, her heitt varð á kommununa um at verða teimum til hjálpar.



*Sundalagið verður vinarbýur við Rissa kommunu í Noregi*